KLAVER-MODUL
Yamaha P50-m við sera vælljóðandi akk. klaveri, el-klaver, rhodes o.a., til sølu fyri 2.200 kr.
Tlf. 216197, e. kl. 18

SYNTH-MODUL
Yamaha MU55 við nógvum og fjølbroyttum synthljóðum, GM og XG kompatibelt, til sølu fyri 1.800 kr.
Tlf. 216197, e. kl. 18

Út- & Sjónvarp

SJÓNVARP
ynskist bíliga til keyps.
Tlf. 261646

PARABOLSKERMUR
til sølu.
Tlf. 448417

Ymiskt

TIL SØLU
Casio 208SR kassaapparat, umvælt af Farodane í januar 2001. Prísur kr 2400 u/ mvg.
Tlf:458011

PERSIENNUR
Tvær træ persiennur, 1,45 m, og ein hvít, 1 m.
Tlf. 314580

TAK KJANSIN!
Far út á internetið, www.ezinfocenter.com/4269048, og tekna teg til, um tú hevur forrætningssans. Tú skalt byrja við at koyra bossin! Um nakar spurningur er, so ring á
Tlf. 250726

FARTELEFON
Blá Nokia 8210 við løðara, bil løðara, handsfree og tvey covers. Við mongum hentleikum til sølu fyri einans 1.700 kr.
Ring á tlf. 254124

MULTI VENJINGARBONKUR
POWERMAX, model 70072, til sølu fyri 4.000 kr.
Tlf. 320365/210365

TELEFONKORT
G1 telefonkort til sølu.
Tlf. 424567

ERICSSON T285
Fartlf. til sølu fyri uml. kr. 2.000.
Tlf. 222971

TB OLD BOYS
Vit byrja at venja á Sevmýri 12.1. kl. 17 og venja hvønn leygardag kl. 17 – um viðrar.

TIL SØLU
Baðikar við enda- og síðuplátum og vaski við soylu, bæði í brúnum, til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 313979, e. kl. 17

TIL SØLU
Brúkt husmor vindeygu til sølu. Stødd: H=110, B=150.
Tlf. 447487

GÓÐ FUGLABYRSA
Heilautomatisk byrsa av slagnum Remington modell 11-48, kaliber 20, til sølu. Prísuppskot kr. 7.000. Ringi
315091 millum kl.18-20

MOTIÓNSSVIMJING
er hvørt týskvøld frá kl. 19.00 til 20.30.
Fuglafjarðar Svimjifelag

TIL SØLU
Luft-fritura til sølu.
Tlf. 213145

VASK TIL BAÐIRÚM
Hvitt vask, 55x40, v/ hvítum blandingskrana, til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 316264

FARTELEFON
Nokia 450 NMT til sølu.
Tlf. 310122

TIL SØLU
Eina Nokia 3330, 6 mør. gomul, til sølu fyri 1500. kr og cover harry-potter við gummi knøttum og eina mynd av froskum fyri 90 kr stk. Tlf. 316646
e-mail: st2008e5@skulin.fo

MOTOROLA V3690
Ein tann minsta fartelefonin í heiminum til sølu. Vigar bert 79 gr. Hevur voice-dial, vibrator, ymiskar ringitónar og m.a. Til sølu fyri bert 1.200 kr. Send ein mail:
kd@post.olivant.fo

HEILSANIR



Góðu omma og abbi
Góða omma hjartaliga tillukku við 58 ára degnum í dag og allarbesti abbi, tillukku við 60 ára degnum sum var 5. januar. Takk fyri at tit altíð eru so góð við meg.
Heilsan, Júst

Góði, fitti Zakaris
Hjartaliga tillukku við 7 ára degnum og alt tað besta í framtíðini.
Vivian og Hanus



Góði Fróði gubbi!
Hjartaliga tillukku við tínum 13 ára degi
ynskir Astrið

Góði, elskaði Zakaris
Hjartaliga tillukku við 7 ára føðingardegnum 14. januar. Jesus pápi signi lívsleið tína.
Kærar heilsanir, mamma og babba

Góða Ninni
Hjartaliga tillukku á 10 ára degnum í dag. Alt tað besta í framtíðini.
Bestu ynskir, mamma og Eigil

Góða Ninni
hjartaliga tillukku við 10 ára degnum tann 15. januar. Hav nú ein góðan dag
Bestu heilsanir, babba

Góðu mamma og babba
Hjartaliga tillukku á silvurbrúdleypsdegnum. Takk fyri alt tit eru fyri okkum.
Heilsan, børnini

Góða Begga og Solberg
Hjartaliga tillukku við silvurbrúdleypsdegnum í dag.
Heilsan, Á. og T.

Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

5 ferðir um vikuna

Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag. Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:.....
.....
.....
.....
.....
.....

Myndina aftur: Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: .....
Bústaður: .....
Bygd/býur: ..... Tlf.: .....

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«

TILTØK

Ebenezer
Í dag kl. 17 Frítíðararbeiði. Mikukvøldið kl. 20 Uppbyggingarmøti.
Hóskvøldið kl. 20 Kvinnumøti har Marion Jensen verður við, kl. 20 Ungdómsmøti.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

Meinigheitshúsið
Týskvøldið kl. 20 Bíbliutími. Mikukvøldið kl. 19 Meinigheitskórið venur. Kl. 20 Ungdómsmøti, YM-møti við Hera Kjærbo.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 YM-møti v/ Hera Kjærbo, barnaansing verður.
Mánakvøldið kl. 20 venur Manskórið.

Rhema á Hálsi
Bønarmøti verður mána-, týs- og mikukvøldið kl. 20.
Fríggjakvøldið kl. 18-19.30 ATAP Kids.
Fundarøðin við Jens Garnfeldt: Fríggjakvøldið kl. 20 Møti.
Leygarmorgunin kl. 10-12 Opið leiðaraseminar (øll við eini ella aðrari ábyrgd í samkomuni kunnu møta). Kl. 20 Møti.
Sunnudagin kl. 11 og 18 Møti. Sunnudagsskúlin er kl. 11. Øll eru vælkomin.

Meinigheitin í Hoyvík
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti í Brekku 3.
Sunnudagin kl. 14 í Hoyvíkar skúla Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn og kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Hebron, Argir
Mikudagin kl. 20 Bønar- og Uppbyggingarfundur, Evald Sørensen leggur fyri.

Hvítusunnusamkoman
Yviri við Strond
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, kl. 18: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

Filadelfia
Landavegur 22
Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

Samkoman Immanuel
Mikukvøldið kl. 20 Møti.

Vestmanna Missiónshús
Missiónsvikan byrjar í kvøld kl. 20 við Regin Høgnesen úr Leirvík, Raymund og tey spæla og syngja.
Mikukvøldið er møti kl. 20 við Margeir Toftegaard úr Fuglafirði, Magda, Maibritt og Robin syngja. Bønarløta er 1/2 tíma undan møtunum.

Filadelfia, Sundalagið
Miðdepilin og Urtagarðurin halda frí til 16.01.02.

Keldan, Skálafirði
Ungdsómsráðstevna í bygdarhúsinum á Strondum. Hesi tiltøk eru almenn:
Fríggjakvøldið kl. 20 Møti v/ Jan Honningdal og Magnus Persson. Kl. 22.30 Praise explosion við Liquid Gravity og Eyðun Jacobsen.
Leygarkvøldið kl. 19 Møti v/ Magnus Persson o.fl. Kl. 22.30 Praise explosion v/ Jan Honningdal o.fl.
Sunnudagin møti í Kelduni kl. 17 v/ Paula Høj og Jan Honningdal.
Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

Siloa, Fuglafirði
Bøn, bíblilæra og hugnalig samvera verður í Siloa mikukvøldið kl. 19.30, Jørundur Hansen talar. Evni: Trúboðaravirki í Grønlandi. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Soli Deo Gloria
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti, Jóhann Petur Jóhannesen talar.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.

Missiónshúsið í Gøtu
Týskvøldið kl. 20 Bíbliuundirvísing, 1. Kor. kap. 7, 17-40 v/ Peter O. K. Olofson.

Café One Way, Tvøroyri
Tórskvøldið kl. 18.30 venur dansibólkurin.

Betel, Vágur
Ónsdagin kl. 20 Uppbyggingarfundur.

Dagtilhaldið Fløvin
heldur til í húsinum hjá Kongshavnar Kvinnufelag. Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 15.00-18.00. Allir pensionistar eru vælkomnir.

Dagtilhaldið í Vági
Dagtilhaldið er opið týsdag og hósdag frá kl. 15.00-18.00. Øll eru vælkomin.

Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 212380.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við
Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórshavn
tlf. 311391/261516.

Tilhaldið
í Tórsgøtu 21, tlf. 316491
Opið er mánadag kl. 10-18. Týsdag-fríggjadag kl. 10-17. Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
Mánadagin 14. januar
kl. 9.45-10.15 Fimleikur Sonja Danielsen
kl. 10.15-12 Ítriv (Framtíðarætlanir)
kl. 14-18 Kortspæl, telving og onnur spøl. Tilmelding til døgurðan mikud. og fríggjadag tlf. 316491
Týsdagin 15. januar
kl. 10-12 Vit baka
kl. 10-11.30 Sangur. Eyðun Sørensen. Øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 15 Frásagnir, søgur, prát o.a.
Mikudagin 16. januar
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði. Høvi er at koma sum gestur
kl. 15 Túrur
Hósdagin 17. januar
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
Fríggjadagin 18. januar
kl. 10-13 Matgerð Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði. Høvi er at koma sum gestur
kl. 13-17 Opið hús

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

AA-fundir í Havn
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Fundur verður í kvøld kl. 20-21.30.

AA-fundur í Eysturoy
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan.
Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla lærararaíbúðin).

AA-fundir í Vágum
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

AA-Suðuroy
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 21.00 og sunnudag kl. 15.00.

Al-anon
hevur fundir hvørt mánakvøld kl. 20.30 í gomlu læknahúsunum á Tvøroyri.